**Jørgen Niclasen**
**Landsstýrismaður**

**Svar**

**upp á**

**skrivligan fyrispurning nr. 72/2014 eftir tingskipanini § 52a frá Bjarna Djurholm, løgtingsmanni, um at verkafólk missa 1100 kr. um mánaðin orsakað av politikki samgongunnar**

**Spurningurin var soljóðandi:**

1. Hvørja ávirkan á pensiónina hevur forskatting av inngjaldinum í mun til, um pensiónin verður skattað við útgjaldi?
2. Hvussu verða løntakarar skattaðir í prosentum í sambandi við forskattingina og í mun til skatting við útgjaldi?
3. Hvussu stóra upphædd hevur vanligur verkamaður at ráða yvir við pensiónsaldur við forskattaskipanini í mun til gomlu skipanina?
4. Er minni peningur í umfari í samfelagnum nú í mun til um forskattingin ikki varð framd?
5. Eru livikorini versnað hjá verkafólkum orsakað av forskattingini og flatskattaskipanini?
6. Áðrenn forskattingina var kapitalpensjón skattað við 35%, men nú verður øll pensjón skattað við 40%, hvat heldur landsstýrismaðurin um hesa skattahækking?

**Svar:**

**Til spurning 1**
Er skattaprosentið tað sama í báðum førum, hevur tað ongan týdning fyri skattgjaldaran, hvørt eftirlønin verður skattað við inngjald ella við útgjald. Hetta kann prógvast við at seta upp tvey einføld dømi.

| **Dømi 1** | ***ár 1*** | ***ár 2*** | ***ár 3*** | ***ár 4*** | ***ár 5*** |
|---|---|---|---|---|---|
| Inngjald við ársbyrjan | 100,00 | 100,00 | 100,00 | 100,00 | 100,00 |
| Renta við ársenda (5%) | 5,00 | 10,25 | 15,76 | 21,55 | 27,63 |
| Samlað saldo við ársenda | 105,00 | 215,25 | 331,01 | 452,56 | 580,19 |
| Skattur við útgjald (40%) | | | | | 232,08 |
| **Útgoldið eftir skatt** | | | | | **348,11** |

Í dømi 1 rindar skattgjaldarin 100 kr. inn árliga. Rentan er 5% og skatturin er 40% við útgjald. Eftir 5 árum er útgjaldið 348,11 kr.

| **Dømi 2** | ***ár 1*** | ***ár 2*** | ***ár 3*** | ***ár 4*** | ***ár 5*** |
|---|---|---|---|---|---|
| Inngjald við ársbyrjan | 60,00 | 60,00 | 60,00 | 60,00 | 60,00 |
| Renta við ársenda (5%) | 3,00 | 6,15 | 9,46 | 12,93 | 16,58 |
| Samlað saldo við ársenda | 63,00 | 129,15 | 198,61 | 271,54 | 348,11 |
| Skattur við útgjald (0%) | | | | | 0,00 |
| **Útgoldið eftir skatt** | | | | | **348,11** |

Í dømi 2 verða inngjøldini skattað við 40%, soleiðis at árliga inngjaldið lækkar niður í 60 kr. Útgjaldið er nú skattafrítt. Eftir 5 árum er útgjaldið neyvt tað sama: 348,11 kr.

Er skattaprosentið tað sama í báðum førum, er tað sostatt líkamikið fyri skattgjaldaran, um eftirlønin verður skattað við inngjald ella við útgjald. Hann fær neyvt tað sama útgoldið í báðum førum.

**Til spurning 2**
Eftirløn, ið verður skattað sum skattskyldug inntøka við útgjald, kann hava ymiskt skattaprosent, alt eftir hvussu nógva aðra inntøku viðkomandi hevur umframt eftirlønina.

Samhaldsfasti og fólkapensjónsviðbótin hava við sær, at nærum allir skattgjaldarar í pensjónsaldri í minsta lagi hava eina skattskylduga inntøku á umleið 70.000 kr. (giftir pensjónistar liggja nakað undir 70.000 kr., og stakir liggja nakað omanfyri). Tað avgerandi í sambandi við eftirløn er sostatt, hvussu skatturin er frá 70.000 kr. og uppeftir.

Í 2011 var støðan soleiðis, at miðal kommunuskattaprosentið var 21,43%, heilsutrygdargjaldið var 0,55%, og landsskatturin av inntøku millum 70.000 og 140.000 kr. var 18%. Samanlagt gevur hetta ein skatt á 40,0% av inntøku millum 70.000 kr. og 140.000 kr., og 40% mundi tí verða áleið tað, sum tey flestu rindaðu í skatti av sínari eftirløn við útgjald.

At skatturin á pensjónsinngjøld varð settur til júst 40% er tí ikki tilvildarligt, tí talan er um júst tað skattaprosentið, ið tryggjar, at skatturin á eftirløn verður áleið tann sami sum frammanundan fyri flest møguligar skattgjaldarar.

Útrokningar hava verið frammi, sum siga, at skatturin á eftirløn er øktur úr 30% upp í 40%. Men hesar útrokningar eru veruleikafjarar, tí tær ganga út frá, at samansparain í pensjónsaldri als onga aðra skattskylduga inntøku hevur enn sjálva eftirlønina.

Hóast afturvístar sum skeivar fleiri ferðir, eru hesar útrokningar framvegis javnan frammi, og hetta haldi eg vera keðiligt, tí hetta hevur fingið summi at føla eina ónøgd, sum í veruleikanum er ógrundað.

**Til spurning 3**
Sum greitt frá í spurningi 2, er skattaprosentið áleið tað sama við inngjald sum tað var við útgjald, og í spurningi 1 varð víst á, at er skattaprosentið óbroytt, hevur tað ikki nakran týdning fyri skattgjaldaran, um tað almenna tekur skattin við inngjald ella við útgjald. Samanlagt má tí sigast, at umleggingin hevur ikki havt nakra stórvegis ávirkan á, hvussu nógv samanspararar fáa útgoldið við pensjónsaldur.

**Til spurning 4**
Tað kann tykjast løgið, at skattur av pensjón skal lænast til eftirlønarkontur í upp til 50-60 ár, áðrenn tað almenna fær sín skatt. Ella sagt á annan hátt, hví fólk skulu tvingast til at skylda skatt í áravís, áðrenn tey sleppa at rinda.

Eisini er tað soleiðis, at landið er lítið, og vegna váðaspjaðing verður nærum allur eftirlønarkapitalurin settur at arbeiða uttanlands. Skatting við útgjald hevði sostatt við sær, at stórar upphæddir árliga vóru drignar úr føroyska búskapinum. Í dag er tað í staðin soleiðis, at inntøkur frá forskatting av pensjónum verða fluttar kommununum til at reka eldraøkið fyri.

Eisini er umráðandi at hava í huga, at nýggja pensjónsskipanin fer at hava við sær, at tey sum í dag eru í góðum árum koma at bera tað sokallaðu "dupultu pensjónsbyrðuna". Tað vil siga, at tey bæði skulu rinda fólkapensjón til undanfarna ættarlið og spara saman til sína egnu pensjón. Varð ikki forskatting sett í verk, hevði byrðan í staðin verið trýdupult, tí so høvdu tey eisini noyðast at lagt út fyri allan tann útsetta skattin, ið framhaldandi skatting við útgjald hevði havt við sær. Tað vil siga, at fara burtur frá forskatting – sum mong mæla til – er at leggja stein oman á byrðu.

**Til spurning 5**
Sum víst omanfyri, hevur nýggja skipanin ikki broytt skattaviðurskiftini stórvegis, tá um eftirlønina ræður. Men hinvegin hevur flatskattaskipanin við sær, at tey, sum ynskja at betra um livikorini hjá sær og sínum við at arbeiða nakrar tímar eyka, nú fáa væl meira útgoldið enn frammanundan.

**Til spurning 6**
Sannleikin um kapitalpensjón er tann, at talan er ikki um nakra veruliga pensjón. Kapitalpensjón kann rindast út í einum við 60 ára aldur og er tí ikki at meta sum nøkur verulig eftirløn. Heldur ikki kann kapitalpensjón mótroknast í fólkapensjón.

Eisini bleiv kapitalpensjón nógv brúkt av teimum vælbjargaðu fyri at sleppa bíligari í skatti. Áðrenn flatskattin spardu tey við høgari løn meira enn 60% í skatti av inngjøldum á kapitalpensjón, meðan útgjøld einans rindaðu 35% í avgjaldi. Tað vil siga, at tey við høgari løn fingu ein skattalætta á meiri enn 25% fyri tann partin av inntøkuni, tey rindaðu til kapitalpensjón.

At skatturin á kapitalpensjón hækkaði var ikki annað enn rímiligt. Hetta vóru tey flestu eisini samd um. Eisini kann nevnast, at í upprunaliga pensjónsnýskipanaruppskotinnum, sum Aksel

V. Johannessen legði fyri løgtingið í 2011, var skotið upp, at kapitalpensjón skuldi rinda avgjald á 45%.

Fíggjarmálaráðið, 31. mars 2015

**Jørgen Niclasen,**
fíggjarmálaráðharri